# Lítil toskur, men góður prísur

**Besti toskaprísurin liggur í løtuni uppi á umleið 25 krónum fyri kilo – og toskurin av Føroyabanka hevur enntá uppaftur betri prís**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Høgni Hansen, sum starvast á Fiskamarknaði Føroya, sigur, at prísirnir á hýsu í løtuni liggja úr góðum 10 krónum og upp í einar 17 krónur fyri kilo – alt eftir støddini.

Hann sigur, at nøgdirnar av hýsu 1 á marknaðinum eru smáar, men hesin fiskurin liggur millum 14-17 krónur fyri kilo.

– Hýsa 2 liggur millum 12 og 13 krónur fyri kilo, og hýsa 3 liggur um góðar 10 krónur fyri kilo, sigur Høgni.

**Lítil toskur**

– Tað er ógvuliga lítið av toski á marknaðinum, men tann toskur, sum er, hevur havt góðan prís.

Høgni Hansen sigur, at toskur 1 og 2 hevur ligið millum 23 og 24 krónur og heilt upp í 25 krónur fyri kilo, meðan toskur 3 og 4 hevur ligið upp í 21 krónur fyri kilo.

– Toskurin av Føroyabanka hevur ligið uppaftur hægri í prísi, leggur hann aftrat.



*Er útboðið lítið, er prísurin høgur – og øvut. Soleiðis er toskaprísurin góður í løtuni, nú so lítil toskur er á marknaðinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Línuskipini hava smáligan fiskiskap

**Tríggir línubátar landaðu á Toftum fyrrapartin í dag. Veiðan lá úr 20.000 pundum upp í 30.000 pund**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin var fram við á Fiskamarknaði Føroya í morgun, har tríggir línubátar landa í dag.

Veðrið hevur verið heldur vánaligt og óstøðugt seinastu dagarnar, og fiskiskapurin hjá línubátunum hevur heldur ikki vignast nakað serligt.

**Smáar nøgdir**

Thomas Nygaard, sum hendan túrin hevur verið á Føroyabanka, hevði eini 20.000 pund, harav umleið 11.000 pund var hýsa og stívliga 6.000 pund toskur.

Sum skilst, hevur Thomas Nygaard gjørt ein stuttan túr, men fiskiskapurin hevur heldur ikki verið nakað serligur.

Línubáturin, Gullberg, sum er fyrrverandi Sæborg, hevði 30.000 pund. Teir hava roynt eystanfyri, og meginparturin av veiðini er hýsa.

Jógvan Norði er eisini komin aftur av túri. Teir hava eini 28.000 pund inni, harav 22.000 pund er hýsa.

Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya sigur, at fiskurin hjá línubátunum skuldi seljast um telefonina fyrrapartin í dag.

**9 útróðrarbátar**

Aftrat Thomasi Nygaard, Gullbergi og Jógvani Norði, eru einir níggju útróðrarbátar eisini á marknaðinum í dag.

– Meginparturin av fiskinum verður seldur um telefonina, og eitt sløð verður eisini selt á gólvinum, sigur Høgni Hansen




*Í morgun lá línuskipið Thomas Nygaard og landaði á Fiskamarknaði Føroya. Línuskipini, Gullberg og Jógvan Norði, landa eisini á Toftum í dag*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Hans Petur hevur ikki selt

**– Eingin endalig avgerð er tikin um sølu, sigur Hans Petur Ellingsgaard, handilsmaður í Saltangará**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stórar broytingar fara fram í handilsvinnuni í Føroyum í løtuni.

Nógv verður selt, og nógv verður keypt. Fyritøkur skifta eigarar sum ongantíð áður.

Tað hevur ljóðað, at Hans Petur Ellingsgaard, sum eigur nýggjan og stóran bygning í Saltangará, har eitt nú Kiosk Vár húsast, skal hava selt sítt virksemi.

Men hetta avsannar Hans Petur og sigur, at einki er selt, og eingin endalig avgerð er tikin um sølu.

Tað skilst tó á handilsmanninum, at okkurt er í umbúna, sum hann tó ikki vil siga nakað um í løtuni.

Rembingarnar í handilsvinnuni eru stórar í løtuni, og tá ið slíkar søgur ganga um eigaraskifti í fyritøkum, hevur seinasta tíðin mangan víst, at sjáldan er roykur av ongum brandi.